# Kunning til sjóvinnulæknar

**Nýtt heilsuprógv til sjófólk**
Sjóvinnustýrið hevur framleitt eitt nýtt heilsuprógv til sjófólk. Nýggja heilsuprógvið kemur í staðin fyri Bláu bók, og til ber at útfylla skjalið á telduni.

Nýggja heilsuprógvið er eina A4-síðu til støddar og er tøkt at taka niður frá heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum. Sostatt er ikki longur neyðugt at útvega sær bláar bøkur frá Sjóvinnustýrinum.

Upplýsingarnar í heilsupróvnum eru samstundis dagførdar samsvarandi STCW-sáttmálanum og MLC-sáttmálanum.

Ein nýggjur teigur er komin í oyðublaðið, har sjófólkið skal geva samtykki til innheintan av fleiri upplýsingum. Hesin teigur skal bara útfyllast, tá ið læknin metir, at hetta er neyðugt fyri at gera kanningina.

**Gildi**
Frá 1. januar 2023 skal einans nýggja heilsuprógvið verða útflýggjað eftir læknakanning.
Galdandi bláar bøkur (heilsuprógv) varðveita sítt gildi fram til ásetta lokadagin í bláu bókini.

**Vegleiðing**
Heilsuprógvið kann takast niður á heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum.

- Sjófólkið útfyllir s. 1.
- Læknin útfyllir s. 2-3
- Síða 4 verður síðani sjálvvirkandi útfylt grundað á upplýsingar, ið verða koyrdar inn á síðu 1-3, tó so at nakrar fáar nýggjar upplýsingar eru, sum læknin má útfylla.
- Sjófólkið skal undirskriva heilsuprógvið.
- Bara síða 4 skal (prentast og) latast sjófólkinum.

Gev gætur, at talgilda oyðublaðið virkar best í Adobe Acrobat.

Eru spurningar ella ivamál um nýggja heilsuprógvið, ber til at venda sær til Sjóvinnustýrið á tel. 355600 ella fma@fma.fo.